Álit II

í

løgtingsmáli nr. 31/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk (Broytt tillagað starv, nýggj javning o.a.)

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, hevur lagt málið fram 30. september 2020, og eftir 1. viðgerð 8. oktober 2020 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 20. oktober og 3. og 24. november 2020. Við 3. viðgerð 10. desember 2020 varð málið beint aftur í nevnd. Nevndin hevur síðan viðgjørt málið á fundi 11. desember 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Uni Rasmussen, Rósa Samuelsen, Erhard Joensen og Jóhan Eli Poulsen) mælir staðiliga til, at skipanin við tillagaðum starvi og skipanin um fyritíðarpensión, verður endurskoðað. Endamálið við lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk (tillagað starv) er at gera tað eggjandi hjá fólki at hava størst møguligt tilknýti til arbeiðsmarknaðin eftir førimuni. Tað skal vera ein samanhangur ímillum skipanirnar, sum fevna um hendan málbólkin og tað er tí avgerandi, at m.a. skipanin við møguleikaváttan verður innført, soleiðis, at tað verður so gott og trygt grundarlag sum gjørligt fyri at avgera, hvørja skipan tann einstaki hoyrir til. Fyri at tryggja stabilitet verður mælt til at kanna møguleikan fyri, um allir politiskir flokkar eru áhugaðir at vera við í arbeiðinum.

Meirilutin heldur, at øll tey, sum í dag eru í skipanini við tillagaðum ella vardum starvi, skulu halda fram undir galdandi treytum. T.v.s. at hægst loyvda lønaríkoyti verður óbroytt, kr. 22.000. Tó so, at um persónar, sum eru í skipanini við tillagaðum starvi undir galdandi skipan, skifta starv, verða tey fevnd av broytingunum, sum koma í gildi eftir 1. januar 2021.

Tískil hevur meirilutin soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"*Stk. 2.* Persónur, sum er í tillagaðum ella vardum starvi, áðrenn henda løgtingslóg fær gildi, fær lønaríkoyti eftir higartil galdandi reglum. Tó verður áseting og eftirlit í sambandi við tillagað starv framt eftir ásetingunum í § 23, stk. 2 og 3, sum ásett í § 1, nr. 12 og 13."

Viðmerkingar:

Við hesi broyting verður partur av stk. 2 strikað. Talan er um partin, sum ásetir, at lønaríkoyti ikki kann vera hægri enn 19.900 kr. um mánaðin. Hesin parturin verður strikaður. Øll verandi tillagað støv – t.v.s. tey, sum áðrenn henda lógin kemur í gildi eru í tillagaðum starvi – halda fram óbroytt og hægst møguligt lønaríkoyti verður framvegis 22.000 kr. um mánaðin.
Ætlaða sparingin á fíggjarlógini upp á umleið 1 mió. kr. verður sostatt ikki framd.

Við hesi broyting tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Sirið Stenberg, Hervør Pálsdóttir og Aksel V. Johannesen) mælir frá at samtykkja uppskotið við hesum viðmerkingum:

Minnilutin fegnaðist um, at málið bleiv beint aftur í nevnd, tí nógvir spurningar vóru ósvaraðir. Serliga vóru avleiðingarnar av upprunauppskotinum og avleiðingarnar av broytingaruppskotinum hjá meirilutanum ov illa lýstar.
Minnilutin ynskti at fáa hoyringar í nevndarviðgerðini og setti fram ynski um tað, men tað bleiv ikki gingið á møti. Vit blivu einans kunnað um broytingina hjá samgongutinglimunum í nevndini.
Vit ynsktu at fáa lýst avleiðingar av uppskotinum, og munin millum fólk í verandi skipan og nýggju skipanini. Hetta fingu vit ikki møguleika til. Vit ynsktu eisini at fáa greiðu á, hvussu nógv fólk vóru í hvørjum lønarbólki, so vit sóu, hvussu fólk blivu rakt. Harumframt ynsktu vit at fáa greiðu á, hvussu broytingaruppskotið hjá meirilutanum rakar ymisku bólkarnar, tí nevndin fekk sendandi skriv, sum setti spurnartekin við, hvør bleiv harðast raktur av sparingini. Av tí, at okkara ynski ikki blivu gingin á møti, stendur hetta ósvarað.
Minnilutin fegnast um, at tað eydnaðist okkum at fáa málið aftur í nevnd, sum gjørdi, at samgongan bakkaði og slepti ætlanini um at skerja lønaríkoytið upp til 2.100 kr. um mánaðin. Men vit taka als ikki undir við, at treytirnar hjá fólki í tillagaðum starvi vera so nógv verri fyri øll nýggj, sum koma inn í skipanina. Sama er galdandi fyri fólk, sum skifta tillagað starv.
Vit skilja ikki, at samgongan ætlar at gera livikorini hjá fólki, sum koma í tillagað starv, so nógv verri. Og vit skilja heldur ikki, at samgongan ger umstøðurnar so nógv verri hjá fólki við skerdum førleika at vera á arbeiðsmarknaðinum.
Málið er sera principielt. Kjarnin í málinum er, um vit skulu fara frá, at fólk, sum bera brek - og ella hava skerdan arbeiðsførleika, skulu hava løn sambært sáttmála, ella um tey í mesta lagi kunnu forvinna tað, sum ein arbeiðsmannaløn er. Lógaruppskotið vísti á, at ongin í tillagaðum starvi fór at liggja undir eina arbeiðaraløn. Seinni er tó komið fram, at tað ikki er rætt. Fleiri fara at liggja undir eina arbeiðaraløn. Frameftir verður lønarparturin frá arbeiðsgevara sambært sáttmála og lønaríkoytið frá landinum at rokna sum ein veiting. Hetta merkir í veruleikanum, at inntøkan hjá fólki í tillagaðum starvi kann broytast við løgtingslóg á hvørjum ári. Tað er als ikki nøktandi.

Tað snýr seg eisini um hugburð til fólk við breki ella skerdum førleika. Sjálvsagt skulu fólk í tillagaðum starvi hava góðar umstøður og góð kor á arbeiðsmarknaðinum. Løgtingið átti at gingið á odda fyri at fingið enn fleiri fólk í tillagað starv.

Týdningurin av at vera á arbeiðsmarknaðinum fyri trivnað og lívsgóðsku má ikki undirmetast. Í 2009 samtykti Løgtingið ST-sáttmálan um rættindi hjá fólki, sum bera brek. Minnilutin er sannførdur um, at hetta lógaruppskot ikki er í samsvari við ST-sáttmálan.

Eisini av teirri orsøk eigur Løgtingið ikki at samtykkja uppskotið.

Lyklahugtøk í ST-sáttmálanum eru javnvirði, bannan av mismuni vegna brek, samhaldsfesti og kompensatión. Breksáttmálin byggir á eina menniskjafatan, har virðingin fyri tí einstaka menniskjanum og møguleikarnir hjá hvørjum einstøkum skulu geva treytaleyst somu javnbjóðis rættindi til øll. At forða fyri mismuni vegna brek av øllum slag, og at samfelagið tryggjar øllum borgarum, sum bera brek, javnbjóðis rættindi at liva og virka í samfelagnum á jøvnum føti við øll onnur.

Tað, sum landsstýrið nú leggur upp til er, at fólk við breki ikki skulu hava løn sambært útbúgving, akkurát sum øll onnur, tá ið tað snýr seg um lønarpartin hjá landinum. Í spurningum, sum nevndin hevur sett landsstýrismanninum, gongur eisini greitt fram, at landsstýrið ikki sær lønarpartin hjá landinum sum løn, men sum eina veiting.

Minnilutin metir lønarpartin frá landinum sum kompensatión fyri skerdan førleika, sum ST-sáttmálin eisini leggur upp til. Tí eru vit ikki samd við meirilutanum í Trivnaðarnevndini og síggja hetta uppskot, sum um at mismunur verður lóggivin.

Vit stúra fyri avleiðingunum av uppskotinum. Eitt er tað fíggjarliga, sum vit ikki taka undir við. Hin parturin er hugburðurin til fólk við skerdum førleika á arbeiðsmarknaðinum. Lógarbroytingin eggjar ikki fólki við skerdum arbeiðsførleika at útbúgva og førleikamenna seg, sum annars er grundleggjandi fyri øll onnur á arbeiðsmarknaðinum og grundleggjandi fyri at varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin. Tað menniskjaliga virðið í at kenna seg til nyttu í samfelagnum, at hava nakað at fara upp til, og skapa sær ein meiningsfullan gerandisdag, er fyri flest fólk besta bót til eitt eydnusamt, meiningsfult lív.

Minnilutin metir, at lógarbroytingin økir um vandan fyri, at fleiri fólk fara at blíva fyritíðarpensjónistar heldur enn at fara í tillagað starv.

Tað, sum meirlutin mælir til, letur upp fyri, at tvey fólk við sama skerda arbeiðsførleika á sama arbeiðsplássi fara at fáa sera ymiska inntøku, um annar er í nýggju skipanini og hin í gomlu skipanini. Meginreglan um somu løn fyri sama arbeiði verður brotin. Harvið fáa vit A og B borgarar. Og tað fer eisini at verða ein stórur fíggjarligur smeitur hjá fólki í tillagaðum starvi at skifta starv.

Allar tær mongu hoyringarnar í Trivnaðarnevndini hava mælt Løgtinginum frá at fremja hesa lógarbroyting. Og nýggju broytingarnar hava vit ikki havt møguleika at fingið lýst, tí vit fingu ikki høvi at gera hoyringar.

Minnilutin er sera harmur um broytingina og kann als ikki góðtaka mátan, landsstýrið fer við teimum, sum onkursvegna eru við skerdan lut í samfelagnum. Minnilutin skilir ikki, at sparingarnar hjá samgonguni skulu raka tey veikastu í samfelagnum.

Minnilutin tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 11. desember 2020

Uni Rasmussen
formaður

Sirið Stenberg
næstformaður

Aksel V. Johannesen

Hervør Pálsdóttir

Rósa Samuelsen

Jóhan Eli Poulsen

Erhard Joensen